VIÐMERKINGAR

# Eitt væl goymt herðaklapp til tjóðveldisfólk

**Stórar broytingar eru í tølunum frá seinastu veljarakanning til ta nýggjastu. Onkur flokkur gongur fleiri prosentstig fram, meðan aðrir ganga fitt aftur. Kortini fáa vit stuttligar útleggingar um, hvussu væl tað gongur í landsins leiðslu.**

**Høgni Hoydal**



Hoyrdi úrslitið av nýggjari veljarakanning í Útvarpinum. Lurtaði væl – og í einum eykasetningi kom fram, at Tjóðveldisflokkurin var væl størstur við 25,7%.

Hugsi, at hetta man vera ein tann mest markanta framgongdin, vit hava havt í veljarakanningum seinastu 6-7 árini. Eg skal viðganga, at eg altíð eri sera varin at tulka veljarakanningar á bæði ein og annan bógv. Satt at siga, so hóvar mær sjáldan ov góðar veljarakanningar fyri flokkin, tí tær kunnu skapa vónir, ið ikki hava hald í veruleikanum. Men tá framgongdin er fleiri prosentstig, so vísa tær helst eitt rák, sum vit eiga at gera alt til tess at halda fast um, við at betra enn meiri um arbeiði okkara í flokkinum.

**Kritisk og konstruktiv andstøða**

Vit hava í Tjóðveldisflokkinum valt at arbeiða sum ein bæði kritisk og konstruktiv andstøða. Tað halda vit er okkara skylda. Vit halda neyvt eftirlit við øllum arbeiðinum hjá landsstýrinum. Vit finnast at – eisini hvassliga – , har tørvur er á tí. Og vit taka undir og geva rós, har vit halda skilagóð stig verða tikin.

Men harafturat hava vit í andstøðu roynt at bróta burtur úr nýggjum. Vit leggja okkara egnu uppskot fram til tess at broyta samfelagið og seta greið mál við ítøkiligum uppskotum. Vit vísa støðugt á alternativ til førda politikkin og vísa á, hvussu okkara uppskot skulu fíggjast. Nevnast kunnu eitt nú uppskot um egnan uttanríkispolitikk, Búskapargrunn, vinnupolitikk, alternativa fíggjarlóg, skúlabygging, samferðslu, pensiónsbroytingar, javnstøðu og mentanarframtøk.

Eisini eru vit farin undir miðvísar fundir kring landið til tess at fáa enn fleiri fólk at taka lut í politiskum arbeiði og geva ávirkan á arbeiði floksins.

Tí er ein slík veljarakanning fyrst og fremst eitt herðaklapp og ein íblástur til tingfólkini, ið hava arbeitt sera seriøst. Men eisini til kommunupolitikarar floksins og til øll tey, sum sjálvboðin arbeiða fyri floksins hugsjónum og menning.

**Løgnar niðurstøður**

Men veljarakanningin gjørdist stuttlig á ein heilt annan hátt, tá eg hoyrdi, hvussu Útvarpið hevur valt at gera tíðindi burturúr kanningini.

Høvuðstíðindini fríggjadagin og leygardagin vóru samrøður við formann Sambandsfloksins og við Jóannes Eidesgaard, løgmann. Báðir fegnaðust og søgdu seg hava fingið okkurt slag av álitisváttan í hesari kanningini – ja, løgmaður gav enntá okkurt skotið til formann Tjóðveldisfloksins.

Eg undraðist, men kom eftir, at Útvarpið bert samanber tølini hjá flokkunum við úrslitið á seinasta løgtingsvali og bert leggur dent á munin millum Anfinn Kallsberg og Jóannes Eidesgaard sum løgmansevni í hesi kanningini – eins og var hetta fyrsta kanning av sínum slag.

**Veljarakanningar vísa eitt rák**

Nú veit eg ikki, um eg havi misskilt okkurt grundleggjandi viðvíkjandi veljarakanningum. Havi altíð hildið, at veljarakanningar hava bert tað virðið, at tær kunnu vísa á eitt rák yvir tíð, tá ið einfaldir og greiðir spurningar verða endurtiknir regluliga.

At samanbera tølini bara við seinasta valúrslit, vísir ikki eitt rák ella broyting yvir tíð, nú samgongan hevur sitið helvtina av valskeiðnum. Tað áhugaverda er at hyggja eftir allari gongdini frá valúrslitinum yvir fylgjandi kanningar til í dag.

Soleiðis verða veljarakanningar eisini brúktar alla aðra staðni. Hugt verður at, um tað gongur upp ella niður í kanningunum. Tá ið broytingarnar eru undir hálvt prosent, er heldur ikki vanligt,at gera nakrar nýggjheitir burtur úr tí - tá er tað innanfyri statistisku óvissuna og ber mest boð um status quo.

**Tríggjar størri broytingar**

Sum eg dugi at síggja, so eru tríggjar størri broytingar í hesi kanningini í mun til seinastu veljarakanningar:

1. Tjóðveldisflokkurin fer rættiliga týðiliga fram - ja, hetta man helst vera ein tann frægasta veljarakanningin hjá flokkinum seinastu árini.
2. Javnaðarflokkurin var størstur í seinastu kanning, men sær út til at missa fleiri prosentstig í mun til seinast.
3. Persónliga undirtøkan hjá sitandi løgmanni minkar í mun til seinastu kanning.

Kortini eru tíðindini, sum verða borin út, at løgmaður og Sambandsflokkurin eru vinnarar í kanningini.

**Hevði verið stórtíðindi í øðrum londum**

Sjálvandi síggja vit politikarar altíð veljarakanningar við okkara partapolitisku brillum og royna at venda øllum til okkara fyrimun.

Men í hesum føri ber av, tá kanningin nærum verður vend á høvdið.

Um vit samanbera við onnur lond, so eru veljarakanningar ikki altíð nøkur nýggjheit, tí tær verða gjørdar so javnan.

Men tað hevði sanniliga verið ein nýggjheit – og stjórnarleiðarin hevði verið tráspurdur av øllum miðlum – um hann misti persónliga undirtøku í veljarakanningum og um hansara flokkur gekk fleiri prosent aftur í mun til seinastu kanning.

Tað er sjálvsagt harmiligt fyri samgonguna og løgmann, og okkara fjølmiðlar fara vónandi ikki at royna at vinda so nógv burturúr veljarakanningum, sum vit síggja í øðrum londum. Men tá tær nú verða gjørdar, so tykir tað mær rættiliga løgið at nýta alla orkuna til at fáa nakað heilt annað burturúr teimum, enn tað – kanska sera tíðaravmarkaða – rák, ið tær hóast alt kunnu siga nakað um.

# Sami peningur kann ikki inntøkuførast fleiri ferðir, Jan!

**Heðin Mortensen**
*borgarstjóri í Tórshavnar kommunu*



Eitt av okkara góðu orðatøkum sigur, at »ilt er at læra gamlan hund uppi at sita«. At hetta eru fyrndarorð, hevur fyrrverandi borgarstjórin, Jan Christiansen, prógvað í ríkiligt mát, nú hann fleiri ferðir – enntá í størsta álvara – hevur mælt til, at kommunalur peningur verður inntøkuførdur fleiri ferðir!

Í sínum alternativa uppskoti, tá fíggjarætlanin fyri 2006 varð samtykt í Tórshavnar býráð, mælti minnilutin millum annað til, at tað átti at komið borgarunum í Tórshavnar kommunu til góðar, at kommunan fær afturgoldið nógvan pening úr kommunala veðhaldsgrunninum. - Ja, Jan hetta er komið borgarunum til góðar.

Peningurin úr kommunala láns- og veðhaldsgrunninum, vanliga róptur kreppulánsgrunnurin, er longu inntøkuførdur í roknskapinum hjá Tórshavnar kommunu. Og tað ber ikki til at inntøkuføra sama pening fleiri ferðir!

Um hugt verður í lítla faldaran »Tórshavnar kommuna í tølum 2005« ella undir teigin »Tórshavn í tølum« á heimasíðuni hjá kommununi (torshavn.fo), ber til at síggja, at árini frá 1994 til 1997 var eitt prosent lagt aftrat vanliga skattaprosentinum. Hetta er tann inntøkan, Tórshavnar kommuna lánti í kreppulánsgrunnin.

Síðani hevur í fleiri ár staðið í viðmerkingunum til roknskapin hjá Tórshavnar kommunu, at »upphæddin í Kommunala láns- og veðhaldsgrunninum er tann av kommununi inngoldna, frátrekt tað, kommununnar partur er niðurskrivaður við vegna hjálp til skuldartyngdar kommunur og tað, sum kommunan hevur fingið útgoldið úr grunninum.«

Í ár heldur grunnurin uppat at virka, innistandandi verður gjørt upp, og Tórshavnar Kommuna fær sín part áleið 22 milliónir krónur ið verða afturrindaðar, men uttan at tær kortini kunnu inntøkuførast nú, tí tað eru tær longu frammanundan. Tí ber heldur ikki til, sum minnilutin hevur skotið upp, at rokna við hesum peningi sum nýggjari inntøku.

Í einari allarsíðstu roynd at »læra gamlan hund uppi at sita«, skal eg koma við einum lítlum dømi, ið átti at gjørt hetta klokkuklárt: Um eg láni 100 krónur frá Jan og síðani beri honum tær aftur, er hann ikki blivin 100 krónur ríkari fyri tað!

Ei heldur verður Tórshavnar kommuna 22 milliónir krónur ríkari av, at hesar somu 22 milliónir verða bornar aftur úr kreppulánsgrunninum. Tí ber tað snøgt sagt ikki til, sum Jan Christiansen skrivar, at »hesar 22 milliónirnar eiga at leggjast aftrat inntøkusíðuni«.

Vónandi stendur tað nú einum og hvørjum greitt, at einki fíggjarligt grundarlag var undir ynskinum hjá Jan Christiansen og minnilutanum um at halda fram við sama skattaprosenti, uttan at ætlaða virksemið hjá Tórshavnar kommunu verður skert tilsvarandi.

# Degnshús og eftirtíðin

**Jógvan Arge**
*Varaborgarstjóri í Havn*

Eg havi ongantíð ivast í, at núverandi minniluti í Tórshavnar Býráð heldur enn fegin vildi sleppa at halda fram ta vandalismuna, sum ferð aftaná ferð seinastu 40 árini hevur tikið seg upp í býráðnum Havn, og sum aftur tók yvirhond í seinasta setu.

Úrslitið er ein miðbýur, sum hvørki líkist einum ella øðrum. Tinghúsvegurin frá Bøkjarabrekku og omaneftir er molesteraður til tað ókenniligu og sama er at siga um byggingarnar framvið Niels Finsensgøtu frá Vaglinum og niðaneftir.

Vit havnarfólk eru kend langt út um landoddarnar fyri tað skilagóða varðveitingararbeiði, sum gjørt er í gomlu Havnini úti í Tinganesi og á Reyni. Her fáa vit framvegis rákan av fortíðarinnar umstøðum í ymsum tíðarskeiðum, sum er so neyðugur fyri nútíðina.

Tað fáa vit eisini á Vaglinum enn. Vaglið er tann nýggjari miðbýurin í Havn. Lagdur til rættis av einslistum av skilamonnum í Havn fyri og um aldarmótið 1900. Hví skula vit ikki eisini varðveita ta umhvørvið sum áminning um ta tíðina, sum



saktans eisini kann vera partur av okkara tíð?

Tað, sum vit hava eftir av hesum nýggjara miðbýnum í Havn, er júst húsagarðurin kring Vaglið. Enn kunna vit við reistari pannu vísa á Meinigsheithúsið, Kommunuskúlan, Bókhandilin, handilshúsini hjá Jacob Lützen, sethúsini hjá Anton Degn og løgtingshúsið.

Innan fyri hendan húsagarðin hevur hjartað í Føroya høvuðsstaði verið í góð 100 ár við bæði Vagli og Tinghúsvølli, og hetta hjarta eiga vit at virða.

Eg ivist ikki í, at tað er vandalisma at fara at byggja háhús framvið Vaglinum og Tinghúsvøllinum. Har er nóg ringt sum er í grannalagnum. Háhúsabygging fer at lýta umhvørvið og hóvar ikki saman við hesum gamla stolta miðbýi í metropolinum í Norðuratlantshavi.

Vit hava ivaleyst av lendi í Suðurstreymi at seta skýskravarar á, og tí nýtist okkum ikki at kroysta teir niður í tann gamla miðbýin.

Tórshavnar býráð hevur eisini ásannað, at húsini hjá Degn vóru varðvetingarverd. Tí játtaði býráðið í farnu setu pening til umvæling av teimum. Tað skuldi merkt, at húsini vórðu standandi, sum tey eru.

Men teir, sum ráddu fyri borgum, syrgdu ikki fyri at tryggja sær hetta við einum servitutti ella byggisamtykt, og tí er ongin ideel loysn møgulig í dag.

Vilja vit varðveita umhvørvið við Vaglið og Tinghúsvøllin, er einasta gongda leið er at keypa okkum burtur úr probleminum.

Tað pínur í lummanum, men skal miðbýurin ikki fara fyri hund og ravn, so er ikki annar vegur enn at gjalda pengarnar.

Pengar kunnu erstattast. Tað kann miðbýurin ikki.

So latið smáfuglar, heiðafuglar – og miðbýin – hava frið!